# Býráðsfundur 24.02.2025

**<u>Býráðsfundur 24.02.2025 kl. 18.00</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhølið | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Atli F. Johansen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elin Ó. á Torkilsheyggi | x |
| | Henning Erhardsson Joensen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Niels Jacob Nielsen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**<u>Mál til viðgerðar:</u>**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 10/2025 – Byggiloyvi matr. nr. 113c | ALMENT |
| Mál nr. 11/2025 – Byggiloyvi matr. nr. 267a | ALMENT |
| Mál nr. 12/2025 – Grundstykki matr. nr. 440q | ALMENT |
| Mál nr. 13/2025 – Grundstykki matr. nr. 746y | ALMENT |
| Mál nr. 14/2025 – Graslíki | ALMENT |
| Mál nr. 15/2025 – Umsókn um stuðul | ALMENT |
| Mál nr. 16/2025 - Tímar til barn við serligum tørvi | ALMENT |
| Mál nr. 17/2025 - Broyting í Kommunustýrisskipanini 2. Viðgerð | ALMENT |
| Mál nr. 18/2025 – Tænastu avtala til spæliplássini | ALMENT |
| Mál nr. 19/2025 – Tilboð uppá at skifta tekju og at klæða eldra partin á Frítíðarskúlanum | ALMENT |

# Býráðsfundur 24.02.2025

**<u>Mál nr. 10/2025 – Umsókn um byggiloyvi matr. nr. 113c, Nes – Sólja Thomina Petersen ALMENT</u>**

<u>J.nr.: 1201-34-2024</u>

Í umsókn, dagfest tann 09.12.2024, søkir Jóannes Petersen, arkitektur, vegna Sólju Thominu Petersen, um byggiloyvi til matr. nr. 113c á Nesi.

Talan er um sethús í tveimum hæddum við einvegis takhalli. Byggistigið er 0,12 og nýtslustigið er 0,20.

Bilskýlið er leyst frá húsinum, og er oman móti vegnum í norðurendanum á stykkinum.

Sethúsini lúka treytirnar og ásetingarnar í byggisamtyktini, og tískil mælir tekniska deild til at útskriva byggiloyvi.

**Á fundi, tann 13.02.2025, mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi á matr. nr. 113c sambært viðløgdu tekningunum frá 21.01.2025.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**<u>Mál nr. 11/2025 – Umsókn um byggiloyvi til seyðahús eystanfyri Høganes – Magnus P. Poulsen ALMENT</u>**

<u>J.nr.: 1201-10-2021</u>

Nes kommuna hevur verið í samráðingum við Katrin og Magnus Paula Poulsen um bygging av einum seyðahúsi eystanfyri Høganes.

Nú fyriliggja tekningar, so at byggiloyvið kann viðgerast.

Seyðahúsið er 16m langt, 6m breitt og er 3,6m upp til yvirtrom. Seyðahúsið hevur lága reising og hevur flór 1,2m frá lendisgólvinum.

Málið er partur av eingum gomlum máli, ið hevur verið í gongd í nógv ár. Partur av avtaluni er eisini, at kommunan syrgir fyri byggibúning til seyðahúsið.

# Býráðsfundur 24.02.2025

Yvirfriðingarnevndin hevur viðmerkingar til bygginginа, serliga um, at staðseta húsið soleiðis, at tað er so lítið sjónligt sum gjørligt í landsslagnum.

Tekniska deild mælir til at geva byggiloyvi sambært fyriløgdu tekningunum.

**Á fundi, tann 13.02.2025, mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi til seyðahúsið sambært viðløgdu tekningunum frá januar 2025.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 12/2025 – Grundstykki matr. nr. 440q á Brekkukletti ALMENT**

J.nr.:1206-2-2022

Í 2022 varð samtykt at bíða við at selja grundstykkið matr. nr. 440q, tí tað varð umrøtt, um stykkið eigur at verða selt til sethúsabygging. Økið hóskar seg væl til eitt fríøki og er eisini partur av lokalu søguni, tí har liggja Bunkrans steinar.

Umsitingin mælir til at leggja økið av til fríøki.

**Á fundi, tann 13.02.2025, mælir Tekniska nevnd til at leggja økið av til fríøki og at broyta byggisamtyktina samsvarandi.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 13/2025 – Grundstykki matr. nr. 746y á Høganesvegi ALMENT**

J.nr.: 1205-3-2025

Grundstykkið matr. nr. 746y hevur ikki atkomuveg og liggur beint uppat spæliplássinum “undir Nesinum”.

# Býráðsfundur 24.02.2025

Umsitingin mælir frá at selja stykkið sum grundstykkið, men mælir harafturímóti til, at økið verður lagt av til fríøki.

**Á fundi, tann 13.02.2025, mælir Tekniska nevnd til at leggja økið av til fríøki og at broyta byggisamtyktina samsvarandi.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd varð eimælt samtykt.**

**Mál nr. 14/2025 – Graslíki ALMENT**

J.nr.: 2006-7-2024

Graslíki á ovara vølli á Svangaskarði má skiftast út í 2025, um vøllurin skal lúka neyðugu krøvini.

Avsett er til arbeiðið á fíggjarætlanini fyri 2025.

Arbeitt hevur verið í eina tíð við at gera fyrireikingar. Sports Lab og LBF hava ráðgivið. Eisini hevur umsitingin verið í samband við fleiri aðrar kommunur og nógv fólk, sum hava royndir og kunnleika til vallarrøkt til tess at fáa greinað, hvussu aðrir vøllir hava roynst.

Nýggjastu royndirnar vísa, at verandi stoytdoyvingarlag eisini má skiftast út.

Nes kommuna hevur biðið um tilboð uppá nýtt graslíki við tilhoyrandi stoytdoyvingarlagi frá Føroya Møblasølu v/Birgiri Andreasen og Laiderz v/Ásvald Simonsen.

Tilboðini eru viðheft, og tey komu inn áðrenn ásettu tíðarfreistina mikudagin 12. februar kl. 13.

Tilboðsgevararnir greiða frá á fundinum.

Møblasølan verður til steðar á fundinum í Teknisku nevnd, meðan samskiftið við Laiderz verður umvegis Teams.

Tilboð frá Føroya Møblasølu v/Birgiri Andreasen/ Domo Sports er viðheft.

Tilboðini frá Laiderz v/Ásvald Simonsen eru viðheft.

# Býráðsfundur 24.02.2025

Sambært ráðgeving frá SportLabs eigur stoytdoyvingarlagið at verða skift út..

Umframt tilboðskostnaðin skal væntast ein burturbeiningarkostnaður av verandi graslíki og stoytdoyvingarundirlagi uppá kr. 500.000 u/mvg.

**Á fundi, tann 13.02.2025, mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum frá Føroya Møblasølu v/Birgiri Andreasen á kr. 4.798.000 u/mvg.**

**Á fundi 21.02.2025 tekur Fíggjaenevndin undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd.**

**Peningurin, kr. 4.798.000, verður tikin av Svangaskarð íløga.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 15/2025 – Umsókn um stuðul til spæliplássið á Gadd ALMENT**

J.nr.: 2001-1-2025

Í teldubrævi, dagfest tann 12.01.2025, søkir Karl Johannessen um fíggjarligan stuðul á kr. 25.000 til spæliplássið á Gadd.

Ætlanin er at brúka játtanina í 2025 til keyp av m.a. útgerð, benkur, borð og máling.

Heitt verður somuleiðis á Nes kommunu um at fáa raðfest at gera arbeiðið framvið Kvíggjarvegi liðugt (gonguteigar, laging, planting).

# Býráðsfundur 24.02.2025

**Á fundi, tann 13.02.2025, mælir Mentanarnevndin til at játta stuðul á kr. 30.000 til endamálið, so sum avsett er á fíggjarætlanini fyri 2025.**

**Á fundi 21.02.2025 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.**

**Tilmælið frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 16/2025 – Tímar til børn við serligum tørvi – Frítíðarskúlin ALMENT**

J. nr.: 1802-69-2025

Í umsókn, dagfest tann 10.02.2025, søkir leiðarin í Frítíðarskúlanum um eyka tímar til børn við serligum tørvi.

Í verandi játtan eru 20 eyka tímar inni í skipanini fram til hálvan apríl, og leiðarin biðjur um at fáa játtanina longda til hálvan juli.

**Á fundi, tann 13.02.2025, mælir Trivnaðarnevndin til at játta 20 eyka tímar fram til hálvan juli.**

**Á fundi 21.02.2025 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndina. Peningurin verður tikin av kontoini "Børn við serligum tørvi".**

**Tilmælið frá Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 24.02.2025

**Mál nr. 17/2025 – Broyting í Kommunustýrisskipanini 2. viðgerð ALMENT**

J.nr.: 1101-16-2025

Í sambandi við, at nýggja býráðið skipaði seg, varð avtalað at avtaka nevndina Burðardygd. Tí er neyðugt at broyta kommunustýrisskipanina samsvarandi.

Umsitingin mælir til at leggja fylgjandi økir aftur til Teknisku nevnd at umsita:

- El, vatn, hiti o.a.
- Orkuplanlegging
- Umhvørvi, umhvørvislóggáva
- Náttúra, frílendi

Økini, sum vóru umsitin í samstarvi millum Burðardygd og Mentanarnevndina, verða nú bert umsitin av Mentanarnevndini.

Harafturat verður orðaljóðið í §3 stk 1, um samsýning til borgarstjóran broytt samsvarandi Kunngerð nr. 93 um samsýningar sambært Kommunustýrislógini.

**Á fundi, tann 20.01.2025, mælir Fíggjarnevndin til at broyta Kommunustýrisskipanina sum nevnt omanfyri.**

**Tilmælið hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt við 1. viðgerð.**

**Á fundi 21.02.2025 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við at broyta kommunustýrisskipanina sum samtykt við 1. viðgerð.**

**Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 24.02.2025

**Mál nr. 18/2025 – Tænastuavtala til spæliplássini – Innspark ALMENT**

J.nr.: 1206-25-2024

Fleiri av spæliplássunum hjá stovnunum í kommununi eru dagførd í farna valskeiðið. Fyri at tryggja, at spæliplássini lúka galdandi treytir um trygd vm., hevur kommunan saman við veitaranum (INNSPARK) av spæliplássunum umrøtt, hvat skal til fyri at tryggja, at hesi pláss verða viðlíkahildin og altíð lúka galdandi reglur.

Sambært avtalu partanna millum, so hevur Innspark sent kommununi uppskot til tænastuavtalu til hesi spælipláss í telduposti tann 11.02.2025.

- Frítíðarskúlin á Svangaskarði kr. 5.600 u/mvg
- Barnagarðurin á Svangaskarði kr. 3.900 u/mvg
- Vøggustovan á Svangaskarði kr. 3.900 u/mvg
- Tofta Skúli kr. 9.950 u/mvg
- Spæliplássið á Svangaskarði (niðari vøllur) kr. 6.950 u/mvg

Samlaður árligur kostnaður verður kr. 30.300 u/mvg.

Tekniski leiðarin saman við Innspark mæla til, at ein tænastuavtala verður undirskrivað partanna millum soleiðis, at kommunan mótvegis gjaldi, kann leggja arbeiðið at viðlíkahalda og trygdargóðkenna spæliplássini í eina fasta legu.

**Á fundi 21.02.2025 mælir Fíggjarnevndin til at málið verður beint í Mentanarnevnduna og Teknisku nevnd.**

**Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

# Býráðsfundur 24.02.2025

**<u>Mál nr. 19/2025 - Tilboð uppá at skifta tekju og at klæða eldra partin á Frítíðarskúlanum  ALMENT</u>**

<u>J.nr.: 2802-2-2024</u>

Nes kommuna hevur fingið tilboð frá Byggivirkinum KBH uppá at skifta tekju og at klæða eldra partin á Frítíðarskúlanum. Tilboðið er áljóðandi kr. 1.139.460 + 6,25 % mvg.

Tilmælið er tí, at fara í samráðingar til sáttmálaundirskrivingar við KBH

NB. Vindfangið á vestursíðuni er ikki við í hesum tilboðnum, hettar skulu vit helst fáa inn í tilboði áðrenn sáttmálin verður undirskrivaður.

**Á fundi 21.02.2025 mælir Fíggjarnevndin til at fara undir samráðingar til sáttmálaundirskrivingar.**

**Eisini verður mælt til,  at vindfangið kemur við í tilboðið.**

**Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**